NÓTASKIP

Fylgiskjal 5

Tilfeingis- og vinnumálaráðið
Yvir við strond 15
Postrúm 347
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 4. januar 2026

Ummælisskriv í sambandi við broytingar í lógini um sjófeingi

Felagið Nótaskip hevur fingið uppskot til broytingar í lógini um sjófeingi til ummælis. Talan er í stóran mun um fleiri tekniskar broytingar, men eisini aðrar broytingar, ið hava serligan týdning fyri uppsjóvarfiskiskapin.

Ov stutt tíðarskeið

Tann mest átrokandi viðmerkingin hjá felagnum Nótaskip snýr seg um ætlaðu broytingarnar í §41, har landsstýrismaðurin kann lýsa undantak frá regluni um, at 25% av svartkjafti, makreli ella norðhavssild kunnu landast uttanlands. Verandi skipan er umsitingarliga tung, og seinastu árini eru dømi um heldur drúgva viðgerð, og tí er tað avgjørt eitt stig rætta vegin, at landsstýrismaðurin fær heimild at lýsa undantak viðvíkjandi landing uttanlands við einari fráboðan heldur enn kunngerð.

Hinvegin tekur felagið Nótaskip ikki undir við, at fráboðanin einans kann verða galdandi fyri í mesta lagi 14 dagar í senn.

Vit halda, at hetta versnar um støðuna hjá uppsjóvarskipunum og manningunum. Tann vanliga myndin seinastu árini hevur verið, at skip liggja í kø, tá ið serliga svartkjaftur verður veiddur og landaður í vertíðini. Tá hevur landsstýrismaðurin vanliga givið undantøk í fleiri vikur. Við treytini um bara 14 dagar í senn, er skjótt at umsitingin hvørja viku skal gera eina nýggja meting um, hvørt eitt nýtt undantak skal gevast ella ei. Hetta verður umsitingarliga tungt – og virkar beinleiðis ímóti at hava eina smidligari og meira effektiva umsiting. Tí skjóta vit upp, at broyta hetta tíðarskeiðið til í mesta lagi fýra vikur. Verður framvegis hildið fast um hesar 14 dagarnar, mæla vit frá at broyta §41 í sjófeingislógini.

Frá kunngerð til fráboðan

Felagið Nótaskip tekur undir við at geva landsstýrismanninum heimild at lýsa ásettar føroyskar kvotur í einari fráboðan heldur enn í eini kunngerð. Verandi mannagongd við kunngerðum, tá ið einans kvotutøl verða broytt, kann ofta virka tvørlig. Tí er skilagott at gera mannagongdina smidligari og skjótari. Her er vert at gera staðiliga vart við, at tað er avgerandi, at innihaldið í hesi heimildini er

NÓTASKIP

avmarkað til at gera tað lættari og smidligari at áseta kvotur og ikki til at broyta onnur meira grundleggjandi viðurskifti - eitt nú at býta kvotur øðrvísi millum bólkar og skip.

Frágreiðing annaðhvørt ár

Í uppskotinum verður eisini upp, at frágreiðing um sjófeingislógina og avtalur við onnur lond bert verður løgd fyri Løgtingið annaðhvørt ár sambært §7. Henda frágreiðing verður í dag løgd fram á hvørjum ári. Felagið Nótaskip tekur undir við hesari broytingini.

Gildistíðin

Seinastu árini hava limirnir í felagnum Nótaskip endurnýggjað teirra flota. Hetta hevur millum annað latið seg gera, tí fíggingarstovnarnir hava fingið trygd fyri loyvistíðini. Hesin tryggleikin hongur tíverri framvegis í leysum lofti, tí landsstýrismaðurin framvegis ikki hevur lagt uppskot fyri Løgtingið um at leingja loyvistíðina. Felagið Nótaskip stendur framvegis spyrjandi, hví gildistíðin ikki verður longd í hesum uppskotinum. Hetta kann fáa ávirkan á tær treytir, sum fíggingarstovnar veita reiðaríum, ið hava bygt og keypt nýggj skip.

Vinarliga

Felagið Nótaskip

Páll Holm Johannesen, *stjóri*

NÓTASKIP

Felagið Nótaskip
Faroese Pelagic Organization
Óðinshædd 7
P.O.Box 1038
110 Tíórshavn
Faroe Islands
Phone + 298 739910
E-mail: notaskip@notaskip.fo
www.notaskip..fo

Katrina Michelsen

Fra: notaskip@notaskip.fo
Sendt: 27. april 2026 11:35
Til: Fiskimálaráðið Journal
Emne: Ummælisskriv

Góðan dagin.

Felagið Nótaskip hevur fingið uppskot til broytingar í lógini um sjófeingi til skundummælis. Talan er í stóran mun um sama uppskot, sum bleiv sent til hoyringar í november 2025. Okkara viðmerkingar til ta uppskotið eru framvegis galdandi.

Felagið Nótaskip tekur undir við leingja gildistíðina. Kortini hevði verið best um gildistíðin varð longd upp í 12 ár, sum lógin frá 2019 eisini legði upp til. Tað hevði eisini verið ynskiligt, at loyvini vórðu longd av sær sjálvum á hvørjum ári.

Vinarliga
Páll Holm Johannesen
stjóri

NÓTASKIP

Felagið Nótaskip
Faroese Pelagic Organization
Óðinshædd 7
P.O.Box 1038
110 Tórshavn
Faroe Islands
Phone + 298 739910
E-mail: pall@notaskip.fo
www.notaskip..fo